# Bíligari og betri viðgerð av sjúklingum uttanlands

**Bill Justinussen fer nú at seta fólk at hava eftirlit við játtanini til serviðgerð uttanlands**



SERVIÐGERÐ UTTANLANDS
*Áki Bertholdsen*

Nú skal betri tamarhald fáast á á peningin, sum vit brúka til at viðgerða sjúklingar uttanlands.

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, fer nú at seta fólk, sum burturav skal hava eftirlit við játtanini, sum verður sett á fíggjarlógina til serviðgerð uttanlands.

Men endamálið er ikki at skerja møguleikarnar hjá føroyingum at leita sær heilsuhjálp uttanlands.

Tvørturímóti væntar hann, at tænastan fer at vera betri, samstundis sum hon fer at vera bíligari fyri landið.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað verður í næstu framtíð, at eitt fólk skal setast at fáa betri tamarhald á útreiðslunum, sum vit hava til serviðgerðir uttanlands.

Antin talan verður um at søkja eftir fólki, ella um talan verður um at finna eitt fólk í umsitingini at taka sær av hesum arbeiðnum, er ikki endaliga greitt enn, men farast skal undir arbeiðið sum skjótast.

Bill Justinussen sigur, at endamálið við hesum er at fáa betri tamarhad á allari gongdini frá tí at ein sjúklingur verður sendur til serviðgerð uttanlands, til hann er heima aftur í Føroyum.

Sostatt skal fylgjast við gongdini og viðgerðini hjá hvørjum einstøkum sjúklingi fyri at tryggja, at sum mest kemur burturúr.

*– Endamálið er ikki at skerja møguleikarnar hjá føroyingum at fáa viðgerð á sjúkrahúsum uttanlands. Tvørturímóti er væntandi, at tænastan fer at vera betri, samstundis sum hon fer at vera bíligari, sigur Bill Justinussen*

### Alt ov vánaligt eftirlit

Ætlanin hjá landsstýrismanninum er ein avleiðing av, at játtanin til serviðgerð uttanlands er vaksin so ómetaliga nógv seinastu fáu árini og í fjør kemur hon væntandi upp á einar 80 milliónir, ta ið alt verður gjørt upp.

Í ár eru 70 milliónir settar av til serviðgerð uttanlands.

Men søgurnar um, hvussu hesin peningur verður brúktur, ella misbrúktur, eru mangar. Eitt nú er tað tað ikki óvanligt at frætta, at heilsuverkið í Føroyum fær rokning frá Ríkissjúkrahúsinum fyri sjúklingar, sum í veruleikanum liggja á Hotel Tórshavn. Tað eru eisini søgur um fólk, har Ríkissjúkrahúsið ger kanningar umaftur, sum longu eru gjørdar í Føroyum og søgur um fólk ið liggja óneyðuga leingi á sjúkrahúsinum til onga nyttu og bíða eftir viðgerð fyri túsundtals krónur um dagin ístaðin fyri at tey vóru heima, ella á Hotel Tórshavn. Tað eru eisini dømi um fólk, sum fáa viðgerðir ið eru nógv dýrari enn tær áttu at verið.

– Tað eu nógvir leysir endar at fáa skil á og higartil hevur alt ov lítið eftirlit verið við, hvussu hesin peningur verður brúktur, sigur Bill Justinussen.

– Í løtuni er tað so, at tá ið ein yvirlækni í Føroyum sendir ein sjúkling av landinum, er hann fullkomiliga leysur av honum og fær als ikki fylgt við gongdini. Teir hava onga føling við, hvussu játtanin verður brúkt og í prinsippinum kunnu útlendsku sjúkrahúsini skriva tær rokningar, tey vilja. Tí verður neyðugt, at eisini læknarnir í Føroyum fáa fylgt við, hvussu útreiðslurnar til serviðgerð uttanlands verða brúktar.

– Tað er eisini ein trupulleiki at tað er so ójavnt, hvussu vit fáa rokningar fyri serviðgerðina uttanlands. Tað kunnu verða mánaðir, har lítlar og ongar rokningar eru, men so kemur ein rúgva ísenn og hetta ger tað trupult at umsita.

Bill Justinussen sigur, at uppgávan hjá fólkinum, sum verður sett at umsita málið, verður eisini at fáa betri skil á rokningsgongdini, so at tær koma meiri javnt yvir alt árið og at samráðast við donsku sjúkrahúsini um nýggjar avtalur.

### Ringt at rokna út

Er tað trúligt, at tað verður brúk fyri 10 milliónum minni í ár til serviðgerð uttanlands, enn tað var brúk fyri í fjør?

– Tað er ógvuliga trupult at siga, hvat verður brúk fyri av pengum, tí tað er ómøguligt at siga, hvussu sjúk fól verða í ár. Tað kann ganga upp og niður og tað er sumt sum bendir á, at á summum økjum var 2002 eitt undantak. Nógv fleiri hjartasjúklingar vórðu sendir niður, enn væntað og í 10-15 førum var neyðugt at leiga flogfar niður við sjúklingum og tað kostar einar 100.000 krónur hvørja ferð.

– So tað er ilt at meta um, hvat brúk verður fyri. Men tað er týdningarmikið at leggja dent á, at ætlanin er ikki at skerja møguleikarnar hja fólki, sum hava brúk fyri viðgerð uttanlands. Tvørturímóti vænti eg, at tænastan fer at verða betri, tí ein uppgáva hjá fólkinum, sum skal hava eftirlit við serviðgerð uttanlands, skal eisini vera at hava eftirlit við, at fólk fáa tað viðgerð, sum tey skulu hava og sum vit gjalda fyri, sigur Bill Justinussen.

---

*Framhald av síðu 2*

bróta ferðslulógina og vónaðu, at ein sinnalagsbroyting fór at geva okkum eina trygga ferðslu. Hetta ljóðar vakurt, men er tað, sum politikarar siga, tá teir annaðhvørt halda, at ongin trupulleiki er, ella ikki hava hug at gera nakað við hann.

Í hesum føri tykjast fleiri føroyskir politikarar at halda júst tað, at her er ongin trupulleiki. Tú lesur nógv ymiskt í bløðum ella fær úr út- og sjónvarpi misvísandi søgur, sum kunnu fáa fólk at ivast í, um nakrar veðurlagsbroytingar verða. Men politikarar, sum hava ábyrgd av landsins framtíð, kunnu ikki grunda sínar metingar á tílíkt sleyg. Hevur tú illgruna um, at tú er sjúkur, so fert tú ikki bara út á gøtuna og spyr onkran tilvildarligan. Tú fert til læknan; til tann serkøna. Tað sama mást tú gera í hesum førinum. Tú mást spyrja tey serkønu, og tey eru stórt sæð samd. Tað vóru tey kanska ikki fyri 10 árum síðan; men í dag eru næstan allir serfrøðingar samdir um, at útlátið av veðurlagsgassum longu hevur broytt veðurlagið á jørðini sum heild og fer at fáa ógvisligar og veksandi avleiðingar tey komandi 100 árini. Tann, sum hevur hug at kunna seg um hetta, kann fara inn á:http://ipcc-ddc.cru.uea.ac.uk/

So, um føroyskir politikarar velja, ikki at taka undir við Kyoto sáttmálanum, so velja teir samstundis at eyðmerkja føroyingar til at vera eitt av heimsins mest dálkandi fólkasløgum. Men, tað er heldur ikki vist, at vit sleppa so bíliga. So hvørt, sum vit nærkast 2008, og onnur lond seta tiltøk í verk, mugu vit rokna við øktum trýsti frá øðrum londum so sum handilsforðingar, avgjøld ella á annan hátt. Hví skulu tey finna seg í, at vit halda fram við at dálka, meðan næstan øll onnur royna at minka um dálkingina. Eg rokni ikki við, at vit sleppa at verða verandi uttan fyri, og tá er spurningurin bara um at fáa tíð til at gera tey neyðugu tiltøkini.

Um vit leggja eina ætlan nú, so hava vit næstan 10 ár til at seta hana í verk; men fyri hvørt ár sum gongur uttan tiltøk, fer okkara útlát at veksa, og meiri má so skerast, tá vit endiliga fara í gongd. Samstundis verður tíðin at gera nakað styttri. Tað allarminsta, tú kundi kravt av okkara politikarum, var, at teir beinanveg settu tiltøk í verk fyri at steðga vøkstrinum í útláti.

### Kunnu vit minka um útlátið ?

Eftir stendur so spurningurin, um og hvussu, vit kunnu minka um okkara útlát av veðurlagsgassi. Hetta er ikki nakar einfaldur spurningur og fer at krevja nógv arbeiði, tí neyðugt verður at umskipa orkunýtsluna innan fleiri ymisk samfelagsøki. Tað størsta útlátið kemur frá fiskiskipum (32%), og tað verður ivaleyst neyðugt at minka útlátið frá teimum, um nøkur vón skal vera um at halda Kyoto sáttmálan. Hetta skuldi eisini kunna latið seg gjørt. Sambært fiskifrøðingunum kunnu vit upp á langt sikt fiska líka nógv, sum vit gera í dag, men við væl minni flota og minni roynd (færri fiskidøgum). Minni floti og minni roynd skuldu givið samsvarandi minni útlát. Haraftrat brúka teir ymsu veiðuhættirnir (trol, lína, gørn o.s.fr.) ymiska mongd av olju fyri hvørt tonsið av fiski, teir fáa. Tí kann broyting i býtinum millum veiðihættir eisini geva minni útlát við somu veiðu.

Minking av fiskiflotanum ella broytt býti millum teir ymsu veiðuhættirnar fer at krevja almenna stýring, og hetta eru neyvan tiltøk, sum allir politiskir flokkar fara at fegnast um, og tey kunnu heldur ikki fremjast frá einum degi til annan. Men, vit noyðast at ásanna, at orkunýtslan hjá skipunum og teirra útlát mugu takast við í einum komandi fiskivinnupolitikki. Somuleiðis mugu vit fáa ein meiri skipaðan orkupolitikk á landi, so at útlátini frá húsarhaldum, elframleiðslu og øðrum virksemi kunnu tálmast. Eisini tað fer at krevja eitt stórt og miðvíst arbeiði. Her kann tó vera vert at endurtaka, at upp á langt sikt fara tílíkar broytingar á sjógvi og á landi óivað at løna seg fíggjarliga fyri samfelagið sum heild, so hvørt sum oljuprísurin veksur.

Eitt annað øki, sum kann koma at bera stór útlát við sær, er oljuvinnan. Vísir tað seg, at grundarlag er fyri at útvinna olju ella gass á føroyskum leiðum, so fer útlátið ivaleyst at økjast nógv. Hetta hevur verið ført fram sum ein grund móti at taka undir við Kyoto sáttmálanum; men hesin sáttmálin gevur eisini ríkum londum møguleikan at keypa "útlátskvotur" frá øðrum londum. Verður oljuvinna í Føroyum, so fara vit at fáa so nógv burturúr fíggjarliga, at vit væl skuldu havt ráð at keypa tílíkar kvotur. Hetta er kanska ikki tann mest dámligi mátin at minka um dálking; men hann er so í øllum førum frægari enn bara at látast sum einki.

### Niðurstøða

Samanumtikið er tað at taka undir við Kyoto sáttmálanum ein stór avgerð, sum fer at krevja stórar umskipanir av okkara samfelagi; men vit hava neyvan nakað annað val. Tá øll londini rundan um okkum eru farin í gongd við at minka um síni útlát av veðurlagsgassum, hvørki kunnu ella sleppa vit at liggja eftir sum tey einastu, ið halda fram at økja um útlátið. Tað eigur eisini at bera til at fremja tey neyðugu tiltøkini; men tað verður eitt stórt arbeiði. Tað mest umráðandi er, at hetta arbeiðið byrjar skjótt, so at tiltøkini ikki verða ov ógvislig. Tí mugu føroyskir politikarar úr samgongu og andstøðu skjótt toga høvdini upp úr sandinum og viðgera spurningin meiri sakliga.



# Sethúsini sluppu snikkaleys á jólum og á nýggjárinum

**Sum heild sluppu føroyingar rættiliga væl undan eldi á jólum og nýggjárunum, hóast ávarað varð ímóti neyðrakettum, sum kunnu brenna hol á eina tekju. Men hóast jólini eru vandamiklasta tíðin á árinum, tá talan er um eld, so ber ikki til at siga, um fleiri eldsbrunar eru um veturin enn um summarið. Tað er nevniliga altíð týdningarmikið, at eiga ta røttu útgerðina við hús at fyribyrgja eldi**

ELDUR
*Theodor E. D. Olsen*

Nýggjársaftan varð ávarað ímóti neyðrakettum í tíðindasendingini í útvarpinum. Hetta hendi serliga av tí, at eini hús brunnu í grund árið fyri orsakað av hesum fýrverkinum, sum lógin annars sigur bert skal brúkast í neyðstøðu.

Men hóast inniliga varð heitt á fólk um at lata hesar litføgru rakettir vera, so prýddi hetta litfagra fýrverkið aftur hesaferð nýggjárshiminin. Lukkutíð hendi eingin skaði, og sum heild sluppu tey føroysku heimini hampiliga snikkaleys frá jólunum og nýggjárinum. Emil Simonsen, leiðari á bygningsskaðadeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, sigur seg bert hava hoyrt um einstakar eldsbrunar á jólum, sum annars plaga at vera ein nógv vandamiklari tíð enn nýggjárið, tá talan er um vanda fyri eldi. Tí hóast nýtslan av neyðrakettum bara veksur ár undan ári, so er tað ikki vanligt at tær festa í eini sethús, hóast tað er torført at sløkkja eina neyðrakett, um um hon longu hevur rakt eina sethúsatekju. Hon brennur nevniliga í eini 40 sekund, og letur seg ikki órógva av vatni, men heldur á at brenna seg ígjøgnum taktilfarið.

### Jólini vandamikil

Eingi hagtøl eru, sum kunnu vísa okkum um, føroyingar eru varnari ella ósketnari enn fólk í londunum rundan um okkum.

Men hóast jólini sum nevnt er tíðin, tá vandin er størstur fyri eldsbruna, so er torført at siga, um teir flestu eldsbrunarnir henda um veturin ella um summarið.

Tað er nevniliga ógvuliga misjavnt, nær teir ymsu eldsbrunarnir henda, og t.d. næstseinastu jól vóru heilir seks størri eldsbrunar kring landið.

Hesaferð var tað tó bert okkurt einstakt hoyggjhús, sum fórst illa av eldi.

Hóast nýtslan av livandi ljósum um jólini sjálvsagt ger sítt til at gera hesa høgtíðina til eina vandamiklu tíð í brunahagtølunum, so upplýsir Emil Simonsen, at grýtur við feitti eru nógv tann størsta orsøkin til eldsbrunar í brunar í Føroyum. Ein skal nevniliga bara vera óansin eina lítla løtu til tess at geva tí ovurupphitaðu grýtuni frítt rásarum at kóka yvir, og hetta kemur sambært deildarleiðaranum á Tryggingarfelagnum Føroyar rættiliga ofta fyri.

Skaðarnir, sum kunnu standast av slíkum ólukkum kunnu vera alt frá eini oyðilagdari eymhettu til eini sethús, sum eru brend í grund.



*Grýtur við feitti eru vanligasta orsøkin til eldsbrunar í Føroyum, og eru fólk ikki væl tryggjað ella væl fyri fyri fíggjarliga, kunnu tey verða noydd at venda sær til sosialu myndugleikarnar at biðja um hjálp*

### Hvussu verjir ein seg?

Spurningurin er so, hvussu fólk sum frægast kunnu verja seg fyri, at vanlukkan ikki gerst størri enn neyðugt, tá slíkt hendir.

Til hetta sigur Emil Simonsen, at t.d. roykteppir, eldsløkkjarar og og ikki minst roykvarnarar kunnu vera ein loysn.

Tá eldur kemur í eina grýtu, kann eitt roykteppi vera ein tann hentasta fyribyrgingin, men kortini eru tað fá húski, sum eiga slík teppi. Týdningarmikið er eisini at duga at brúka tey rætt.

Eldsløkkjarar eru helst eitt sindur vanligari enn teppini, men vanligast í føroyskum húskjum eru roykvarnararnir, ið somuleiðis eru sera effektivir. Ikki bara kunnu teir fyribyrgja materilellum skaðum, men so sanniliga eisini teimum persónligu, tí slíkir roykvarnarar hava ofta bjargað mannalívum.

Eldsbrunar eru nevniliga ymiskir, og tað kemur fyri, at fólk bara hava ein møguleika, og tað er sleppa sær út úr teimum brennandi húsunum sum skjótast.

### Sosialu myndugleikarnir kunnu koma upp í

Spurdur, hvør trygging er tann frægasta, tá skaðin er hendur, svarar deildarleiðarin Emil Simonsen, at hann avgjørt viðmælir fólki at fáa sær eina pakkatrygging heldur enn bert eina skaðatrygging.

Viðhvørt kann tað nevniliga koma fyri, at meirútreiðslurnar standast av at vera uttan fyri heimið eina tíð. Hetta við pakkatrygging er eisini tann loysnin, sum flestu sethúsaeigarar velja sær.

Kemur tað kortini fyri, at tú ert noyddur at vera heimanífrá eina tíð, av tí at húsini eru brend í grund, og tryggingin bert rindar fyri húsaskaðan, mást tú sjálvur gjalda restina, og tá veldst um, hvussu væl tú ert fyri fíggjarliga.

Í evsta føri kann ein verða noyddur at venda sær til teir sosialu myndug-leikarnar at biðja um hjálp. Hvussu ofta hetta kemur fyri, dugir Emil Simonsen tó ikki at siga.

### Vandamiklar plátur

Sum nevnt er tað sera ymist nær og hvar eldsbrunar henda. Somuleiðis er tað misjavnt hvussu tey føroysku eru fyri, tá talan er um eld. Enn eru tað fleiri, sum búgva í húsum, ið vórðu bygd í seksti- og sjeytiárunum, og sum eru bygd við plátum, sum senda eitrandi gass út, tá tær verða brendar. Eisini bresta tær, tá hitin gerst ov nógvur, og eru tær tí sera vandamiklar.

Tey nýggjaru húsini, sum ikki hava hesar pláturnar, men eru bjálvað øðrvísi, eru tryggari. Tryggasta tilfarið til hús ser tó gips, sum kortini ikki er nógv brúkt í húsabygging í Føroyum, av tí at tað er sera ópraktiskt til onnur endamál, m.a. tyá okkurt skal hangast upp.

Men sum heild kann sigast, at betri er at vera fyrivarin enn eftirsnarin, og tí er gott eiga ein roykvarnara ella aðra útgerð. Eisini eftir, at jóladekoratiónirnar eru tiknar av borðinum.